# Súni Fríði eigur at vera nevndur

**Í europeiskum høpi verður skilnaður gjørdur millum Europa Cup kappingarnar og so Intertoto Cup kappingina, sum verður skattað væl lægri, enn hinar kappingarnar verða**

ALTJÓÐA MÁLSKJÚTTAR
*Jóannes Hansen*



*Suni Fríði Johannesen hevur skotið bæði mál fyri HB og B68 í europeiskum høpi, og í august skal hann royna seg við gøtumonnum í Europa.*

*Mynd: Savnsmynd*

Tá ið vit í gjár umrøddu dystin í Georgia millum Torpedo Kutaisi og B36 komu vit eitt nú inn á báðar B36 málskjúttarnar. Magni á Lakjuni og Bárður Mortansson skoraðu fyri B36 í Georgia. Í tí sambandinum varð nevnt, at teir báðir áður hava skorað í Europa Cup fyri HB. Tá varð eisini lagt afturat, at teir báðir skrivaðu søgu, tí teir eru fyrstu føroysku spælararnir, sum hava skorað fyri tvey feløg í Europa Cup.

Hetta er framvegis púra rætt, men søgan um málini hjá Súna Fríða Johannesen í europeisku kappingunum átti at havt verið nevnd.

Súni Fríði Johannesen hevur spælt í Europa Cup fyri B68 og HB. Tá HB í 1998 var í Europa Cup fyri steypavinnarar, vunnu teir á heimavølli 2–0 ímóti VPS Vaasa úr Finnlandi. Ta ferðina skoraði Súni Fríði Johannesen bæði málini.

Súni Fríði Johannesen hevur ikki skorað í Europa Cup dystum fyri B68. Men tað eigur í hesum sambandi at verða nevnt, at hann hevur skorað í tveimum Intertoto Cup dystum fyri B68.

Í europeiskum høpi verður greiður skilnaður gjørdur millum Europa Cup fyri meistarar og UEFA Cup og inntil fyri heilt fáum árum síðani Europa Cup fyri steypavinnarar á aðrari síðuni og so Intertoto Cup á hinari síðuni. Henda síðst nevnda kappingin er ikki í sama meti sum tær í Europa Cup. Talan er um eina kapping, sum veddingarfeløgini í Europa skipa fyri um summarið, tá eingir landskappingardystir, steypadystir og Europa Cup dystir eru á skránni.

At henda kappingin ikki verður mett á sama støði, sum Europa Cup kappingarnar verða, sæst eitt nú í, at ofta eru tað nógvir eykaspælarar, sum eru á liðnum, tí føstu menninir framvegis eru í summarfrí.

B68 var við í Intertoto Cup í 1996, í fjør og aftur í ár. Í 1996 skoraði Súni Fríði Johannesen, tá B68 tapti 4–1 í Limasol ímóti Apollon, og í fjør skoraði hann, tá B68 á Svangaskarði tapti 4–2 ímóti Sporting Lokeren úr Belgia. Marcello Marcellino skoraði hitt málið.

Altso hevur Súni Fríði skorað fyri tvey ymisk feløg í altjóða skrásettum dystum, men higartil hevur hann bara skorað fyri HB í Europa Cup. Í komandi mánað fer Súni Fríði Johannesen at fáa nýggjan møguleika at skora mál í Europa Cup. Tá skal GÍ, sum hann umboðar í ár, spæla í UEFA Cup.

Henda søgan átti at havt verið nevnd í greinini um málskjúttarnar í Europa Cup, sum var í blaðnum í gjár. Men nú er hon so komin á prent.

### B36 tvey mál

Í hagtalsgreinini í gjár varð sagt, at tá B36 í fyrradagin tapti 5–2, so var tað bara onnur ferðin í føroysku Europa Cup søguni, at tað hevur eydnast einum føroyskum felag at skora tvey mál á útivølli. Hetta er púra rætt, men sum við málunum hjá Súna Fríða Johannesen í Intertoto Cup kappingini, so átti ein søga um eitt úrslit hjá B36 í Intertoto Cup kappingini verið lagt afturat.

B36 var føroyska umboðið í Intertoto Cup í 1997. Teir spældu tríggjar dystir. Á heimavølli taptu tir 5–0 ímóti KRC Genk úr Belgia og 1–0 ímóti Dinamo Moskva úr Russlandi. B36 spældi ein dyst á útivølli. Hann var ímóti Panahaiki úr Grikkalandi. Tann dysturin endaði 4–2 til grikska liðið. John Petersen skoraði bæði málini fyri B36. So kom eisini tað heilt uppá pláss.

# Zuma ætlar at halda fram í FCK

**Útlendski áhugin fyri álopsmanninum er ikki so stórur, meðan útlendingar framvegis sigast hava áhuga í Peter Madsen hjá Brøndby, sum so hevur tryggjað sær topskjúttan í superliguni at loysa av**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*



*Suðurafrikanski álopsfelagin hjá Toda í FCK, Sibusisu Zuma, hevur ongar ætlanir um skifta felag*

*Mynd: Savnsmynd*

Fyrr í vikuni nevndu vit, at hurðin gongur títt í FCK, og at veruleikin í donskum fótbólti er alt meiri og meiri, at »har du penge, så kan du få, men har du ingen, so må du gå«.

Hatta við pengunum tykist vera staðfest eina ferð afturat. Brøndby og FCK kappast um bestu spælararnar og harvið um bestu fyritreytirnar at vinna meistaraskapin. Hini feløgini standa øll við húgvuni í hondini. Tey eru fíggjarliga illa fyri, og sjálvt um tey sjálvandi høvdu viljað havt bestu spælararnar í felagnum, so eru tey kroyst til at selja, tá FCK ella Brøndby ella kanska okkurt útlendskt felag vísa áhuga.

Í fjør var Peter Madsen hjá Brøndby ein av toppskjúttunum í superliguni. Síðani í vár hevur verið roknað við, at Peter Madsen fór at verða seldur til útlandið. Og hóast hann ongantíð kom á vøllin, tá Danmark var í HM endaspælinum, so tykist útlendski áhugin framvegis vera so mikið stórur at keypa, at Brøndby sigst hava tryggjað sær avloysaran. Hann er Kasper Dalgas úr OB, sum eisini var millum toppskjúttarnar í superliguni, men sum ikki taldist millum teir hepnu, sum fyrr í summar fingu HM boð.

Donsku fjølmiðlarnir siga seg vita, at Brøndby hevur bjóðað fíggjarliga illa kroysta OB ein so stóran kekk, at teir í Odense ikki kunnu vísa tilboðnum frá sær. Avtalan millum Brøndby og OB gongur út uppá, at Kasper Dalgas skal flyta úr Odense og til Brøndby í somu løtu, sum Peter Madsen verður seldur til útlandið.

Kasper Dalgas hevur sera góðan bóltførleiki, og tað er nakað, sum dámar nýggja Brøndby venjaranum, Michael Laudrup, sera væl. At 26 ára gamli álopsmaðurin er førur fyri at skora mál á hægsta støði í Danmark prógvaði hann seinasta kappingarár, tá hann skoraði 22 mál í teimum 33 superligu dystunum hjá OB.

### Zuma og skatturin

Álopsfelagin hjá Toda Jónsson, Sibusisu Zuma, hevur leingi verið roknaður sum upplagt evni fyri útlendsk feløg. Tað hevur verið roknað við, at hann fór at verða seldur, tá HM endaspælið var av. Men tað gekk einki serligt hjá Zuma í Fjareystri. Nú er hann aftur í FCK, og í gjár segði hann við danskar fjølmiðlar, at hann hevur einki ímóti at halda fram at spæla fótbólt í FCK, tí hann og familjan trívast sera væl í Keypmannahavn.

Sáttmálin millum Zuma og FCK er galdandi inntil á sumri í 2004. Um sáttmálin skal leingjast, og um Zuma skal fáa tað sama ella helst meiri burturúr, so eru teir í FCK noyddir at rinda nógv meiri fyri hann.

Í Danmark er ein partur av skattalóggávuni, at útlendskir listarmenn eru undir serligari skattaskipan. Talan er um teir, sum vinna meiri enn 700 túsund krónur um árið. Teir rinda bara 25 prosent í skatti. Skipanin varð í síni tíð gjørd fyri balettdansarar, leikstjórar og sjónleikarar og fleiri innan listarligu bransjurnar, men so funnu teir í stóru fótbóltsfeløgunum út av, at her var ein máti at fáa góðar útlendskar spælarar til Danmarkar. Tað ráddi um at kalla teir kunstnarar, og tað góðtók skattavaldið

Trupulleikin hjá FCK og Zuma er, at skipanin bara er galdandi í trý ár. Zuma hevur longu verið í Danmark og í FCK í tvey ár. Tað vil siga, at um eitt ár fer skattatrýstið hjá honum úr 25 prosentum og upp í tey umleið 60 prosentini, sum Todi Jónsson og allir hinir donsku spælararnir í FCK rinda. Tí verður neyðugt hjá FCK at rinda meiri í løn til Zuma, um hann skal hava tað sama eftir á kontoini, tá skattefar, sum danir plaga at taka til, hevur fingið sítt.

Zuma verður í álopinum, tá FCK seinnapartin í dag fer at spæla í Parkini ímóti Club Brügge. Tað er meiri ivasamt, um Todi Jónsson verður við. Tíðliga í hesi vikuni koykti hann fótin undir venjing. Tí var hann ikki við, tá FCK mikukvøldið spældi ímóti Sheffield Wednesday. Fyrrapartin í gjár var hann mest sum komin fyri seg aftur. Men tað var ivasamt, um hann verður ímillum teir fyrstu ellivu í dag.





*Nú fær sterki verjuleikarin, Bartal Eliassen, enn ein fuglfirðing sum liðfelag í GÍ*

# Bárður á Lakjuni skiftir til GÍ

**Orsøkin til brádliga skiftið úr KÍ er, at fuglfirðingurin skal á læraraskúla.**

SPÆLARASKIFTI
*Páll Holm Johannesen*

Bárður á Lakjuni og GÍ eru komin ásamt um ein hálvt annað ára sáttmála. Bárður hevur spælt við KÍ í fyrra hálvu, men hevur nú valt at skifta bláu troyggjuna út við tí gulu úr Gøtu. Bárður á Lakjuni hevur undanfarin ár spælt við ÍF, men í ár hevur hann so umboðað klaksvíkingar.

Fuglfirðingurin hevur fingið nógva spælitíð í Klaksvík, har hann fyri tað mesta hevur verið undir liðini á Kurt Mørkøre í KÍ-álopinum.

### Skal á læraraskúla

Orsøkin til brádliga skiftið, sigur Bárður vera, at hann eftir summarfrítíðina, skal á læraraskúla í Havn, og hann skal gerast pápi, og tí hevur hann ikki líka tíð til fótbóltin. Bárður býr í Leirvík, og ferðingin til Klaksvíkar fer við ov nógvari tíð.

Nýggji GÍ-leikarin leggur dent á, at tað er ikki íkomin nøkur illstøða millum hann og KÍ, og partarnir skiljast í semju.

Honum hevur dámt væl í Klaksvík, og tað er keðiligt, at partarnir vórðu noyddir at skiljast í ótíð.

Fyri GÍ má spælaraskiftið koma væl við, serliga tá hugsað verður um, at álopið hevur verið nógv skert í fyrru hálvu. Pólendinginum Krzystof Popczynski hevur nærum ikki verið at sæð á GÍ-liðnum, tí má Bárður á Lakjuni kennast sum kærkomin styrkur hjá gøtumonnum.

# – Ræðuliga hart

**Teir tríggjir, Dánjal Michaelsen, Hans Krosstein og Bergur Johansen, ætla allir at hjálpast at, so teir saman kunnu gjøgnumføra Statoil Kring Føroyar**

STATOIL KRING FØROYAR
*Páll Holm Johannesen*

Teir ungu føroysku súkklararnir gjøgnumførdu allir tann 120 kilometra langa teinin hósdagin. Hetta má sigast at vera eitt satt bragd. Tá havt verður í huga, at dreingirnir ikki eru meir enn13-15 árs aldur, er avrikið rættiliga flott.

Teir tríggjir, Dánjal Michaelsen 15 ár, Hans Krosstein 14 ár og Bergur Johansen 13 ár eru allir ímillum fremstu súkklararnir í teirra aldursbólki, men at luttaka í Statoil Kring Føroyar er nakað heilt annað. Teir eru allir farnir í kappingina við tí fyri eyga, at klára gjøgnumføra hana.

### Hjálpast at

Teir tríggjir fylgdust til Skálabotn, men tá misti Bergur, og Hans og Dánjal fóru frá honum. Tá komið var til Agnið dróg Hans frá Danjali, og klaksvíkingurin varð fyrstur á mál av teimum ungu luttakarunum.

– Hetta var ræðuliga hart, segði Hans Krosstein eftir kappingina, og var fegin um at allir teir ungu megnaðu at gjøgnumføra.

Fríggjamorginin tosaðu við Hans, og hann var sum vera man rættiliga troyttur, men hann hevði ongar ætlanir um at gevast frá hondini.

– Nei, nú er bara at koyra á, tí nú er longsti teinur súkklaður, og vónirnar um at gjøgnumføra kappingina eru betraðar munandi, greiðir Hans Krosstein frá.

Víðari sigur Hans, at teir ungu súkklararnir ætla allir at hjálpast at, so at teir saman kunnu gjøgnumføra Statoil Kring Føroyar.

### Gøtueiðið strævnasta nakrantíð

Spurdur um hvørji strekki serliga vóru tung hósdagin, sigur Hans, at Gøtueiðið er tað strævnasta, hann nakrantíð hevur súkklað.

– Tá man kemur til Gøtu, eru kreftirnar við at ganga undan, og tí var tað strekki serliga strævið, visir ungi klaksvíksdrongurin á.

Hans Krosstein sigur seg dáma væl súkklulívið, og hann so avgjørt fer at gera nógv við súkklingina í framtíðini.

– At síggja teir professionellu súkklarnar í Tour de France og í Statoil Kring Føroyar gevur mær bara enn betri mót at gera enn meir við súkklingina, sigur Hans Krosstein við Sosialin.

### Kemur av súkklufamilju

Súkklingin er ikki heilt ókent fyribrigdið fyri Hans Krosstein. Í Danmark hevur hann familju, ið ger rættiliga nógv við súkklingina.

Tað eina sysknabarnið er Danmarksmeistari í sínum aldursbólki, meðan hitt eisini klárar seg væl.

Gubbi Hans, súkklar til dagliga ímóti Anders Rasmussen, sum vann etapuna á Eysturoynni, so at Hans eisini er farin undir at kappsúkkla, er kanska ikki so løgi.

# FM í Kast

TÍÐINDASKRIV
*FÍF (Frælsur Ítróttur Føroya)*

Skipað verður fyri FM í teimum fýra kastigreinunum innan tann frælsa ítróttin 23. og 25. juli. Kappingarnar verða á kastibananum í Tórshavn.

Týsdagin 23. juli kl. 17.30 verður byrja við hamarkasti, og tá tað er liðugt byrjar diskos kast.

Hósdagin 25. juli kl. 17.30 verður byrja við kúlustoyt, og tá tað er liðugt byrjar spjótkast. Menn og kvinnur kasta samstundis í øllum greinunum. Tilmelding á staðnum undan kappingunum.

TÍÐINDASKRIV
*Bragdið*

# Renning á Ólavsøku!

Leygardagin tann 27. juli skipar Bragdið fyri rennikappingum á Skálatrøð í Havn. Kappast verður í ymsum bólkum hjá bæði vaksnum og børnum. Startur og mál í øllum kappingum er á Skálatrøð.

Byrja verður kl. 18.30, tá vaksin renna 5 km. Runnið verður nakrar ferðir runt niðri á Skálatrøð og út á Tinganes.

Hóast øll tey vaksnu byrja í senn, so verður kappast í tveimum aldursbólkum: vaksin fødd í 1984 ella fyrr, og vaksin fødd í 1956 ella fyrr (veteranar). Vinnandi maðurin og kvinnan fáa steyp, harumframt fáa nr. 1, 2 og nr. 3 heiðursmerki. Nr. 1, 2 og 3 í veteranbólkunum fáa heiðursmerki.

Kappingin á Ólavsøku er samstundis 6. – og síðsta – umfar í árligu Grand Prix kappingini hjá teimum vaksnu. Hjá monnunum er Bogi Lenvig fremstur við 200 stigum, nr. 2 er Guttorm Sørensen við 140 stigum og nr. 3 er Bogi Joensen við 116 stigum. Hjá kvinnum er Rigmor N. Arge fremst við 200 stigum, nr. 2 er Sólfríð Fjalsbak við 124 stigum og nr. 3 er Brindis R. Weihe við 88 stigum. Bæði hjá kvinnum og monnum eru samlaðu vinnararnir funnir, meðan hinar støðurnar ikki eru endaliga avgjørdar.

Børnini byrja at renna kl. 19.00 tá dreingir og gentur – 7 ár (f. 1995 ella seinni) renna eina ferð runt, t. e. 600m. Síðani renna dreingir og gentur – 10 ár (f. 1992-1994) sama tein

Tey størru børnini skulu renna 2 ferð runt, t. e. 1200m. Kappast verður í hesum bólkum: dreingir og gentur – 13 ár (f. 1989-1991) og dreingir og gentur – 17 ár (f. 1985-1988).

Nr. 1,2 og 3 í teimum ymisku bólkunum hjá gentum og dreingjum fáa heiðursmerki. Vinnarin fær harumframt steyp.

Eins og hjá teimum vaksnu er hetta eisini tann seinasta kappingin í barna Grand Prix kappingini. Spennandi verður tí at síggja hvørjir vinnararnir verða!

Handan av steypum til nr. 1,2 og nr. 3 í Grand Prix kappingini, hjá bæði vaksnum og børnum, verður eftir at fremstu rennararnir á Ólavsøkurenningini eru heiðraðir.

Við vón um at nógv møta til kappingarnar – í fjør vóru uml. 150 luttakarar – verða tey ið ætla at luttaka biðin um, at melda seg til við handilin hjá P/F Valdemar Lutzen ímillum kl. 17.30-18.15.

## Skráðin fyri Ólavsøkurenningina er henda:

| Kl. | Aldursbólkur | Teinur |
|---|---|---|
| 17.30-18.15 | Tilmelding | |
| 18.30 | Vaksin (fødd í 1984 ella fyrr) | 5 km |
| 19.00 | Børn – kappast verður í hesi raðfylgju: | |
| | Børn – 7 ár (f. 1995 ella seinni) | 600m |
| | Børn – 10 ár (f. 1992-1994) | 600m |
| | Børn – 13 ár (f. 1989-1991) | 1200m |
| | Børn – 17 ár (f. 1985-1988) | 1200m |
| 20.00 | Heiðursmerkja- og steypahandan | |